# TILTØK

**Gudstænastur**
**8. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00: Jóannis Fonsdal, altargongd, skriftamál kl. 10.40
***Vesturkirkjan:*** kl. 12.00, Bergur D. Joensen
***Nólsoy:*** kl. 12.00, Sonja Klein
***Vestmanna:*** kl. 11.00, Marjun Bæk
***Miðvágur:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Oyndarfjørður:*** kl. 12.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Norðskála:*** kl. 10.40 skriftamál, kl. 11.00, messa, Emil Olsen
***Dalur:*** kl. 12.00, Sverri Steinhólm
***Kunoy:*** kl. 12.00, Niels Pauli Danielsen, altargongd
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, lestur
***Viðareiðis kirkja:*** kl. 11.00 altarg., Elsa Funding
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, Ólavur Rasmussen

**Norðoya Vistarheim**
Gudstænasta hóskvøldið 21. juli kl. 19.30, Elsa Funding.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har Dánjal Petersen talar, kl. 11.30 Samvera við drekka.
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 talar Eiler Eysturtún. Barnaansing er undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12.00. www.livdin.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Hóskvøldið kl. 21.00 Hollands-teaminum ger klárt at fara.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Marna Nattestad.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Lars Messerschmidt, prestur í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 6.00 Morgunbøn.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, aftaná kaffisteðgin er Summarskúlin fyri børn, kl. 22.00 Útimøti á Vaglinum.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Frá Ebenezer**
Leygardag kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting. Sunnudagsskúlin í summarfrí, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ Atla Rasmussen.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Dánial á Dul Jacobsen talar um evnið: »Hvørjum anda eru vit av og hvørjum anda eru vit í«. Einki møti sunnukvøldið vegna útimøti á Vestanstevnu í Miðvági kl. 19.00.
www.gospel.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Miðvágs missiónshús**
Fríggjakvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti í Bygdarhúsinum.
Leygardagin kl. 21.30-22.15 Útimøti niðanfyri Mylluna. Drekka aftaná í Missiónshúsinum. Kl. 22.45-24.00 inum. Kl. 00.30 Náttkafé (suppa verður eisini at fáa).
Sunnudagin kl. 16.00-16.45 Uttandurða barnatiltak niðanfyri Mylluna. Kl. 20.30 Útimøti niðanfyri Mylluna. Drekka aftaná í Missiónshúsinum. (Viðrar ikki, verða møtini í Missiónshúsinum).
Hjartaliga vælkomin.

## Brúdleyp

Fríggjadagin tann 15. juli kl. 14.00 giftast í Sørvágs kirkju Tórfríð Davidsen, Sørvágur og Dánjal Tavsen, Sørvágur. Døgurði verður fyri innbodnum í Missiónshúsinum Libanon. Vælkomst verður í Sørvágs Bio kl. 20.00

Leygardagin 16. juli kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Mia Krog Elisdóttir av Sandi og Steen Hjartan Sørensen úr Trongisvági. Veitslan verður fyri innbodnum í høllini í Trongisvági kl. 19.00.

Leygardagin 16. juli kl. 10.00 giftast Rúna á Rógvi Simonsen, Vestmanna, og Jákup Olaf Thomassen, Sandavágur, í Sandavágs kirkju. Døgurði verður fyri innbodnum. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, eru vælkomin til náttturða og køkur í ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 19.00.

Leygardagin 16. juli kl. 13.00 giftast í Berøa, Saltangará Linda Højgaard, Saltangará og Godwin Sunder Edwin, Mysore, India. Døgurði verður fyri innbodnum á Sjókaféini í Runavík og opið hús verður eisini á Sjókaféini frá kl. 20.00.

Leygardagin 16. juli klokkan 15 giftast í Havnar Kirkju, Jóna G. Jacobsen úr Hvalba og Poul Laust Christiansen av Argjum. Um kvøldið verður náttturði fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum.

Leygardagin 16. juli kl. 14.00 giftast í Vesturkirkjuni Katrin á Borg Gaard, Hoyvík og Holgar Johannesen, Sandavágur. Veitslan verður fyri innbodnum í Meinigheitshúsinum í Tórshavn kl. 19.00.

Leygardagin 23. juli kl. 17.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Eina Hansen og Kristian Eliasen. Veitslan verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 19.00.

Leygardagin 23. juli kl. 15.00 giftast í Hirtshals kirkju, Eilin Hentze og Dan-Kári Joensen, Skopun. Døgurði verður fyri innbodnum. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum eru vælkomin til Kathrinu og Dánial Joensen, Kærvej 35, Hirtshals frá kl. 20.00.

Leygardagin tann 30. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Elin S. Joensen, Miðvágur, og Tór-Ingar Akselsen, Sandavágur. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í SÍF- húsinum í Sandavági frá kl. 20.30.

Leygardagin 30 juli. giftast í Betania í Skopun kl. 14.00. Davia Gertrud Nicolajsen, Skopun og Hans Jacob Reinert Petersen, Saltnes. Tey ið vilja gleðast saman við okkum, eru vælkomin inn á gólvið hjá Arndis og Jógvan Hendrik Nicolajsen, Skopun, frá kl. 19.00.

Sunnudagin 31. juli kl. 15.00 giftast í Viðareiðis kirkju Julianna O.W. Høgensen úr Klaksvík og Jóhan Sjóstein av Viðareiði. Vælkomst verður í heiminum eftir kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 6. august kl. 13.00 giftast í Kaldbak Sólmei Eydna Rasmussen, Kaldbak og Finn Nolsøe, Kaldbak. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 311999 ella 316797.

Leygardagin 6. august kl. 14.00 giftast í Sjóvar kirkju Anna Elisa Jógvansdóttir, Innan Glyvur og Jimmi Højrup Jepsen, Esbjerg. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, vera biðin um at boða frá á tlf. 447495, 272740 ella 252361, ella skriva til aj_elisa@hotmail.com áðrenn 20. juli.

Leygardagin 6. august kl. 14.00 giftast í Nebo á Toftum, May í Túni og Jan Højgård, Toftir. Veitslan verður kl. 18.00 á Svangaskarði. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449640, 260817, 447647 ella 227230 áðrenn 28. juli.

Leygardagin 13. august kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni, Rannvá Lind Helgadóttir, Vestmanna og Borgar Hansen, Nes. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449988, 424511, 584430 ella 504040 innan 1. august.

Fríggjadagin 19. august kl. 15.00 giftast í Ebenezer í Tórshavn, Rakul Andreassen, Tórshavn og Eyðfinn Olsen, Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 5. august á tlf. 226922 ella 229516.

## Silvurbrúdleyp

18. juli kunnu hjúnini Elken og Arne Simonsen í Hvannasundi halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 23. juli á Hotel Norð á Viðareiði kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma kunnu siga frá innan 15. juli á tlf. 452115 ella 221933.

26. juli hava Ann-Bjørg og Sunnleif Jacobsen, Sandavágur, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 23. juli. Opið hús verður í Missiónshúsinum í Sandavági frá kl. 15.00 til 21.00.

Týsdagin 9. august kunnu hjúnini Eydna og Bartal Kass, Argir halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 13. august. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið, eru vælkomin í neystið - har borðreitt verður við stóra kalda borðinum - og verða vinarliga biðin um at boðað frá á tlf. 31 64 56 ella á tlf. 22 13 10 innan 1. august.

## 80 ára føðingardagur

Leygardagin 16. juli verður Halda Olsen, Hoyvík, fyrrverandi fyristøðukvinna á Ellisheiminum í Havn, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Verkhúsinum Virkni, Berjabrekka 2 (yvir av Mylnuni) frá kl. 10–16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 85 ára føðingardagur

Leygardagin 16. juli verður Lydia Hansen, Norðragøta 85 ár. Føðingardagurin verður hildin í Gøtubrá frá kl. 17.00.

